

## Holst skiftir til Silkeborg

Føroyski landsliðsspælarin Christian Lamhauge Holst skiftir í vetur frá Lyngby til Silkeborg at spæla.1. deildarfelagið Silkeborg hevur stórar ætlanir við sínum liði. Felagið ætlar sær aftur í superliguna, og teir hava styrkt sær liðið við millum annað Henrik Tømrer Pedersen, sum hevur spælt í enskum fótbólti í nógv ár. Nú er tað eisini greitt, at Christian Lamhauge Holst skiftir til Silkeborg at spæla á ársskiftinum. Fleiri feløg hava sýnt áhuga fyri Holst, sum var toppskjútti hjá Lyngby í superliguni farna kappingarár, og um ársskiftið endar hansara sáttmálaskeið í Lyngby. Tá flytir Holst so av Sælandi og til Jútland at spæla fótbólt. – Vit hava tosað um nógvar spælarar, men Christian hevur allatíðina staðið ovast á okkara ynskilista, sigur Peter Kjær, sum er ítróttarstjóri í Silkeborg. Christian Lamhauge Holst hevur higartil spælt 142 dystir fyri Lyngby, og hann hevur skotið 76 mál.

# Katrin er í Kina

**Sunnudagin komu Katrin Olsen, Julianne Elander og báturin »Alexandra« til Kina. Og sambært Katrini skal man líka venja seg við øðrvísi umstøðurnar**

OLYMPISKU LEIKIRNIR

*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Fríggjadagin verða Olympisku leikirnir í Beijing settir, og føroyska umboðanin millum íðkararnar er komin til kinesiska høvuðsstaðin.

– Her er heitt og slavið, men tað hevur ikki ávirkað okkum nakað serligt, letur Katrin Olsen frætta úr Kina. Hóast hetta er fyrsta ferðin, at Katrin Olsen er í Kina, so hevur hon verið í fjareystri áður. Í 2005 var hon partur av dupultfýraranum í lættvekt, sum vann silvur í heimsmeistarakappingini í Japan. Men Kina er heilt øðrvísi, heldur Katrin Olsen.

### Lata væl at venjing

Tað var annars sunnudagin, at Katrin og tey komu upp á pláss. Fleiri vóru merkt av drúgvu ferðini, men Julianne og Katrin báðar lata bara væl at. Eisini at venjingin, sum var í gjár.

Hon og Julianne Elander vandu í báti teirra, sum herfyri varð dóptur »Alexandra«. Árarnar og onkur onnur smáting skuldu líka rættast til, men annars gekk sum eftir ánni hjá teimum, letur Katrin at.

Sambært Katrini er rógvibanin góður. Hann liggur nakað uttanfyri Beijing, og einar tríggjar kilometrar frá hotellinum, har Katrin Olsen og Julianne Elander búgva. Øki, har hotellið hjá teimum er, verður rópt Dragon Villas, og er talan um eitt gott stað.



*Trygdareftirlitið er stórt við leikirnar, og til hvørja venjing skal alt ígjønum ein metaldetektor*

### Hermenn allastaðni

Sermerkt er tó, at á økinum er ein rúgva av herkløddum monnum, sum annaðhvørt standa upprættir og pinnastillir, ella koma marsjerandi. Trygdareftirlitið er eisini øgiligt. Bæði á hotellinum og við venjingarøkið skulu ryggsekkir og annað viðføri skannast, umframt at øll skulu ígjøgnum ein metaldetektor.

– Júst sum vit kenna tað á flogvøllinum, flennir Katrin, sum saman við hin eisini skal vísa serstøk loyvi fyri hermonnunum, áðrenn tey sleppa at venja. Trygdin verður ikki minni næstu dagarnar, nú setanin nærkast. Men tað er bara at fegnast um, og tað ger Katrin eisini.

– OL er ikki byrjað enn, men tað er longu nú super feitt at vera til OL, sigur Katrin Olsen.



*– OL er ikki byrjað enn, men tað er longu nú super feitt at vera til OL, sigur Katrin Olsen*

# Skoti av føroyskari ætt til OL

**Skotin David Carry er meistari í bretska samveldinum, Commonwealth Games, og er bæði HM og EM silvurvinnari. Nú skal hann umboða Bretland til OL**

OLYMPISKU LEIKIRNIR

*Heri Simonsen*
*heris@sosialurin*

Vit føroyingar eru sera spentir uppá, hvussu tað fer at gangast Katrini Olsen og Julianne Elander í rógving, tá tær fara at kappast við heimselituna á Oyggjaleikunum. Men nú frættist, at meiri føroyskt blóð verður á leikunum í Beijing. Og ítróttaráhugaðir føroyingar kunnu gott seta kross við sunnudagin 9. august í kalendaranum.

Henda dagin skal bretska svimjiliðið í stafettini 4 x 200 metrar frí svimja sína fyrstu kapping. Bretar hava góðar vónir til hetta stafettliðið, sum hevur vunnið silvur í bæði evropameistarakappingini og heimsmeistarakappingini í svimjing. Bretar vóna, at hetta liðið kann, ið hvussu er taka eitt silvur ella bronsuheiðursmerki heim til Bretlands.

### Omman úr Klaksvík

Á hesum svimji-stafettliðnum er David Carry úr Aberdeen. Hesin David Carry skal eisini svimja 400 metrar frí til OL í Beijing.

David er føddur 8. oktober í 1981 og er 185 cm langur. David er sonur Jean, sum er dóttur Haslu Elder, sum er ættað úr Klaksvík. Hasla er fødd Josephsen. Mamma David, Jean er millum annað systkinabarn til ein av okkara kendastu kvinnuligu fótbóltsspælarum, nevnliga Malenu Josephsen.

David byrjaði longu at venja í felagnum, Aberdeen Dolphins Svimming Club sum 5 ára gamal. Í dag er hann partur av felagnum, City of Aberdeen Swimming Club.

Longu tíðliga vísti tað seg, at David var eitt stórt talent, og hevur hann lagt nógva venjing fyri dagin hesi mongu árini. Og tað hevur givið úrslit. Umframt HM-silvur og EM-silvur í stafettini 4 x 200 metrar frí, so hevur David eisini vunnið heiðursmerki, sum einstaklingur.

### Commonwealth meistari

David hevur vunnið skotsk og bretsk meistaraheiti, og hevur hann sett fleiri skotsk og bretsk met, sum tað fer at taka drúgva tíð at festa á blað her. Haraftrat er David bretskur samveldismeistari – ella commonwealthmeistari – í bæði 400 metrar frí og í 400 metrar einstaklinga medley. Commonwealth leikirnir hava verið fyriskipaðir síðani 1930, og taka øll lond lut, sum eru limir í bretska samveldinum, og hava Elisabeth II sum drotning.

Stór æra og virðing verður lagt í hesar leikirnar millum limalondini í bretska samveldinum. Ein siður er eisini, at vinnarnir fáa aldargomul ferðasteyp í varðveitslu. David Carry hevur eitt slíkt heima í stovuni í Aberdeen. Har verður tað standandi til næstu commonwealth leikirnar verða í Delhii India í 2010.

### Hevur vitjað í Føroyum

David lesur á Loughborough University í Leicester, og hevur hann onkuntíð vitja í Føroyum saman við familju sínari. Og sæð við tjóðskaparligum brillum hevði tað verið fantastiskt um hann og Pál Joensen møttust til eina 400 metra frí finalu til HM ella EM í framtíðini.



*David Carry hevur føroyska ommu*